## Pál varð næstbestur

Pál Joensen fekk handað tvey silvurheiðursmerki í World Cup í Berlin, sum var um vikuskiftið. Vágbingurin kom næstur á málið í tveimum førum. Í gjár var hann bara aftanfyri Job Kienhuis, Holland, í 1500 metra frí. Tíðin hjá Páli var 14:47.39, sum er fjórðbesta tíðin í heiminum í 2010 á hesum teininum. Pál Joensen var fremstur fyrstu løtuna, og beinanvegin fóru hann og Kienhuis undan hinum. Jón Bjarnason, venjari, væntaði sær gullið í gjár, og tí eru hann og Pál Joensen helst vónbrotnir av úrslitinum. Leygardagin var Pál Joensen nummar tvey í 400 metra frí. Tíðin var 3:44.45.

*-uni*

## Newcastle-venjarin vil hava Kerr

Chris Hughton, venjari hjá Newcastle, vil hava Brian Kerr sum hjálparvenjara. Tað skrivar Daily Mail í dag. Colin Colderwood hevur verið hjálparvenjari hjá Newcastle seinastu mánaðirnar. Hann er nú farin í venjarastarv í skotska Hibernian, og tí manglar Hughton ein hjálparvenjara. Landskappingin í Føroyum er liðug, og Kerr hevur stundir at hjálpa til í Newcastle, umframt at vera landsliðsvenjari, heldur Hughton. Steve Clark, sum fyrr hevur verið knýttur at venjaratoyminum hjá Chelsea og West Ham, var fremst í huganum hjá Hughton, men Clarke leitar í løtuni eftir starvi sum høvuðsvenjari, og hann ynskir ikki at vera hjálparvenjari. Chris Hughton hevur fyrr verið hjálparvenjari hjá Brian Kerr. Teir stóðu á odda fyri írska landsliðnum í tíðarskeiðnum 2003 til 2005.

*-uni*

# Fult við føroyskum profilum

**FÓTBÓLTUR** ÍF Føroyar telur eina rúgvu av profilum, men skiftandi manning og vantandi venjing kosta besta mansliðnum dýrt. - Vit hava tapt átta dystir, men hava verið á odda í fimm av teimum, tá ein hálvur tími var eftir. Tað er bara formurin, tað er galið við, sigur Sigmund Mikkelsen, venjari, ið metir seg hava ein góðan hóp

Rólant Waag Dam




*Rókur av Fløtum Jespersen, Jóhan V. Gunnarsson og Rasmus Nolsøe mynda allir besta liðið hjá ÍF Føroyum*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

Niels Joensen, Marni Djurhuus, Rasmus Nolsøe og Rókur av Fløtum Jespersen. Allir leikarar, sum høvdu farið beint inn í byrjunaruppstillingina hjá teimum flestu føroysku feløgunum. Men felags fyri hesar fýra, umframt fleiri aðrar góðar fótbóltsspælarar er, at teir búgva í Danmark og spæla við ÍF Føroyum, tá teir annars ikki eru í Føroyum og hjálpa sínum feløgum har, sum eitt nú Marni Djurhuus og Rókur av Fløtum Jespersen hava gjørt.

Ikki tí, bróðurparturin, sum spæla við ÍF Føroyum, eru í Danmark í lestrarørindum og útbúgvingin vigar nakað tyngri hjá teimum flestu, enn venjingin ÍF Føroyum. Tí fær Sigmund Mikkelsen eisini fleiri avboð enn flest aðrir venjarar, tí umframt skaðar, leikbann og alt tað vanliga, ið kann koma fyri, so hava hansara menn eisini uppgávur, sum skulu loysast og skrivast í samband við lesnaðin. Uppgávur, ið krevja, at alt fokus er á bókunum og ikki bóltinum.

– So er tað eisini onkur, sum fer til USA og tekur eitt fak har ella til Frankaríkis. Alt hetta ger, at vit hava havt sera skiftandi manning. Taka vit eitt pláss sum miðverjuna, so hava vit havt fýra ymsar samansetingar har seinastu dystirnar, vísir Sigmund Mikkelsen á.

### Eitt sera sterkt lið

Hinvegin, ein góðan dag, tá allir mans eru tøkir, hevur venjarin hjá besta mansliðnum hjá ÍF Føroyum ein luksustrupulleika, tá liðið skal setast. Skálamaðurin Heini Kristiansen hevur vart málið seinastu árini, men hevur nú fingið kapping av eitt nú Jóan Paula Dahl Jacobsen hjá B36, sum hevur vant nakrar ferðir.

Miðverjan kundi verið mannað við Marna Djurhuus og Kaj Ennigarð. Jóhan V. Gunnarsson hevði verið vinstri bakkur og Rani D. Christiansen høgri. Á sentra miðvøllinum høvdu menn sum Niels Joensen, Emil Nolsøe Leivsson og Rókur av Fløtum Jespersen spælt. Hanus Eliasen hevði verið í øðrum borðinum og Pætur Dahl hinum, meðan Dánjal Rói Olsen hevði verið einsamallur maður á topp.

Sigmund Mikkelsen metir, at hansara lið hevði staðið seg í Vodafonedeildini í Føroyum.

– Hópurin er rættiliga góður, tá allir mans eru tøkir. Og um vit vandu fimm ferðir um vikuna og annars høvdu somu umstøður, sum liðini í bestu føroysku deildini, so høvdu vit ikki flutt niður, heldur Sigmund Mikkelsen. Hann vísir tó á, at hópurin kanska hevði verið dekan ov tunnur.

– Men vit høvdu klárað tað, sigur venjarin hjá ÍF Føroyum.

### Verða verðandi í deildini

Hann sigur seg heldur ikki ivast eina løtu í, um lið hansara fer at standa í Seriu 1, hóast teir liggja næstaftast við níggju stigum eftir 11 dystum í løtuni.

– Nei, vit flyta ikki niður. Vit hava tveir dystir eftir áðrenn vetrarsteðgin, og so hyggja vit annars fram móti seinnu hálvu, sigur Sigmund Mikkelsen. Hann ásannar tó, fyrra hálva á ongan hátt hevur gingið sum ætlað.

– Tað hevur yvirhøvur ikki gingið væl. Men vit eru ikki í form og hava havt ógvuliga skiftandi manning, tað kostar okkum nógv stig, sigur Sigmund Mikkelsen. Hann vísir á, at av teimum átta dystunum, lið hansara hevur tapt í ár, hava teir verið á odda í fimm av teimum.

– Vit hava verið frammanfyri, tá ein tími er spældur í teimum dystunum, men missa so seinastu løtuna. Tá er tað einans tí, at vit ikki eru í form. Hini liðini hava vant í alt summar, fleiri ferðir um vikuna og spælt venjingardystir eisini. Vit koma beint á vøllin eftir eina langa og góða summarferiu í Føroyum. Tað kostar hjá okkum og soleiðis er tað hvørt ár, sigur Sigmund Mikkelsen.

Hann hevur verið venjari hjá ÍF Føroyum í trý ár nú, og kennir tískil gongdina og hvussu tað plagar at vera.

– Vit fáa av álvara stig í aprílmánaði og so fram til summarsteðgin. Tað plaga vit altíð, greiðir Sigmund Mikkelsen frá. Orsøkin er so einføld sum tað, at frá fyrst í februar til fyrst í apríl, tá kappingin verður tikin uppaftur, venja menn saman regluliga, uttan at har er nøkur feria í Føroyum, sum ger nakað við formin ella órógvar á annan hátt.

Hetta vikuskiftið hevði ÍF Føroyar frívikuskifti. Tey bæði næstu vikuskiftini bjóða upp á eitt topplið og eitt annað sterkt lið, so tað verður ikki lætt. Hinvegin er landskappingin heima í Føroyum av, og tað kemur væl við.

– So fáa vit nakrar profilar aftur og eru tað sterkari, fegnast Sigmund Mikkelsen.




*Sigmund Mikkelsen er triðja árið á rað venjari hjá ÍF Føroyum*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

*rolant@sosialurin.fo*